# Skipini liggja við fullari bunkring

**EFTIRLIT** – Sjálvandi er hetta ein keðilig støða, men hjálpar-og vaktarskipini liggja við fullari bunkring og eru klár at fara, um okkurt skuldi verið áfatt, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum kortini harmast um støðuna

» ... oljan er ein stórur útreiðslupostur. Játtanin skal halda...
JACOB VESTERGAARD

Vilmund Jacobsen

Landsstýrismaðurin, sum varar av Fiskiveiðieftirlitinum, heldur tað vera ógvuliga keðiligt, at hjálpar-og vaktarskipini ikki kunnu sigla, sum tey nú einaferð kundu hugsað sær, men hann leggur dent á, at neyðugt er at klára seg við teirri játtan, sum stovnurin hevur.

- Og soleiðis verður eisini í komandi ári, leggur hann aftrat.

Jacob Vestergaard vísir á, at olja er ein stórur og tungur postur hjá Fiskiveiðieftirlitinum, eins og yvirlitið á hinari síðuni vísir.

- Sjálvandi noyðist stovnurin at taka tey fyrivarni, sum neyðug eru, nú tað sansar at við játtanini. Men skipini liggja við fullari bunkring og eru klár at loysa, um bráðfeingisboð eru, sigur hann.

## Kortini effektiv

Landsstýrismaðurin sigur, at skipini eru ikki løgd fyri árið, men ásannar, at siglingin verður minni restina av hesum árinum, enn hon hevur verið.

- Hóast siglingin í ár ikki fevnir um eins nógvar tímar, sum okkurt árið, hava skipini kortini verið minst líka so effektiv í ár, sum undanfarin ár.

Jacob Vestergaard vísir á, at eftirlit á landi er minni kostnaðarmikið enn eftirlit á havinum, tá oljan verður havd í huga, og tí fegnast hann um tey átøk, sum stovnurin hevur sett í verk, har lastir hjá skipum og bátum verða kannaðar við bryggjukantin.

- Eftirlitið hevur longu nú staðfest, at skip hava havt ov stóra íblanding av ungfiski, og hetta hevur kostað 14 dagar við ongum fiskiloyvi. Umráðandi er at verja ungtoskin, nú hesin rættiliga vísir seg at ganga inn í fiskiskapin aftur, sigur landsstýrismaðurin.

## Skerdur stovnur

Fiskiveiðieftirlitið er ein av stovnunum, sum verður skerdur í játtanini á fíggjarlógini fyri 2011.

- Hetta er nakað, vit noyðast at fyrihalda okkum til, og hetta kemur – alt annað líka – at merkja, at stovnurin noyðist at tillaga og spara. Oljan er ein stórur útreiðslupostur, og tí hevur Fiskimálaráðið latið fíggjarnevnd løgtingsins vita, hvat neyðugt verður at gera, um játtanin fyri komandi ár skal halda. Uttan at eg skal fara og siga tað, er eyðvitað, at Fiskiveiðieftirlitið í aðrar mátar eisini noyðist at tillaga seg til eina minni játtan, men hvussu stovnurin ætlar at røkka hesum máli, er sjálvandi best at tosa við stovnin um. Men óhugsandi er ikki, at talið av starvsfólki verður nakað skert.

Spurdur, um skerjingarnar hugsandi eisini koma at ganga út yvir manningarnar á Tjaldrinum og Brimli, sigur landsstýrismaðurin, at her eru fastar skipanir galdandi fyri, hvussu skipini eru mannaði, og tí kann hann einki siga um hetta.

- Slíkt eru spurningar, sum stovnsleiðarin saman við sínum fólki í fyrsta lagi kemur at taka avgerðir um, leggur Jacob Vestergaard aftrat.

## Helst optimalt

Landsstýrismaðurin ásannar, at allar best hevði verið, um bæði Tjaldrið og Brimil kundu verið brúkt optimalt, tá vit nú hava hesi skip, men vit noyðast eisini at fyrihalda okkum til teir veruleikar, sum eru.

- Eitt er, at eftirlitið á landi kann skerpast, soleiðis sum Fiskiveiðieftirlitið longu hevur gjørt, men hinvegin slepst ikki undan, at skipini eisini mugu vera virkin á havinum. Teir, sum fiska, eiga eisini at skula vænta sær, at eftirlitið knappliga er á leiðini, har teir royna, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

vilmund@sosialurin.fo



**SPARINGAR**

*- Eitt er, at eftirlitið á landi kann skerpast, soleiðis sum Fiskiveiðieftirlitið longu hevur gjørt, men hinvegin slepst ikki undan, at skipini eisini mugu vera virkin á havinum, sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í fiskivinnumálum*